# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

7. oktober fingu Annika W. Jacobsen og Jens Sørensen, Hoyvík ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3000 gr.

16. oktober fingu Eileen Gullaksdóttur og Martin Lassesen, Charlottenlund, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3750 gr.

29. oktober fingu Jónleyg Eyðunsson og Mortan Mortensen, Vágur, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4000 gr.

4. november fingu Anja Guðmundsson og Niels Annfinn Ellendersen, Hvalba, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3410 gr.

7. november fingu Brynhild Thomsen og P. M. Súni Egholm, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3486 gr.

10. november fingu Karin Poulsen og Edvard Poulsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3825 gr.

11. november fingu Anja Wardum og Òli Svein Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3800 gr.

12. november fingu Fanny Petersen og Bjarni Poulsen, Viðareiði, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4100 gr.

12. november fingu Vónbjørt í Jansagerði og Edward av Kák, Argir, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4150 gr.

13. november fingu Lillian B. og Grímur I. Poulsen, Ljósá, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3500 gr.

Heidi og Atli Johansen, Glyvrar fingu ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 3700 gr.

13. november fingu Mariann P. og Annfinnur Garðalíð, Skála, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3350 gr.

14. november fingu Snna Ludvig Mouritsen og Terje Michelsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3400 gr.

# Til Elly(Atlantu) og (Joen Jacob) Frederik Joensen
## Á diamantbrúdleypsdegnum - gift í 60 ár



Góðu tit bæði. Ikki eru tey mong, sum sleppa at liva 60 ár í sama hjúnalag. Men hetta fara tit at uppliva 27. november, og vit sum standa tykkum nærmast, vilja ynskja tykkum hjartaliga tillukku við diamantbrúdleypinum.

Altíð hevur verið áhugavert og hugnaligt at líða á tá tú pabba, sum tann góði frásøgumaður tú er, greiddi frá hendingun á sjógvi og landi.

Føddur og uppvaksin í Garðinum í Sandvík, men tað var í Vági tú fanst tær konuna, og har settu tit búgv.

Síðstu ferð tú var til bakka, var tá trúlovanarringurin bjargaði tær lívinum. Hált var, og tú fór á glið, heilt út á tromuna, men tá kom ringurin fastur í eina steinpirru. Tú var bjargaður, men tá var avgerðin tikin um ikki at "spæla við lívinum", men heldur raðfesta hana, hvørs navn stóð í ringinum. Tað hevur tú gjørt síðan. Altíð veri ein góður "konumaður", sum mamma plagar at taka til.

Húsini fekst tú upp at standa, sjálvt um torført var við byggitilfarði beint eftir kríggi. Á Oyrabø hava tit so húsast alla tíðina. Við sorgblídni hava tit fylgt við, og sæð næstan allar grannarnar á tykkara aldri fara undir grønu torvu. So er lívsins gongd.

Men gleðin hevur verið stór, tá tað aftur er fari at lýsa í vindeygunum í grannahúsinum. Nú eru aftur børn, og lív komi í. Altíð hava tit verið góð við børn, og orka ótrúliga væl at verða saman við teimum. Sum sunnudagsskúlaleiðari í Frelsunarherinum í næstan 50 ár, vart tú altíð høgt mettur av børnunum. Tínar serligu gávur at greiða frá Bíbilsøgum, eru komin nógvum vágbingum væl við.

Av raskastu og fimastu monnum á sjógv so væl sum á landi. At fiska var tað fáur sum tók Frederik úr Sandvík. Ein skilamaður tá tað galt streym og veður, altíð klára teg væl sum motormaður ella skipari.

Nú eru fetini heldur tung, og ikki at kunna síggja nakað serligt, ger tær lívið tyngri. Men lívsviljin og Gudsóttin ger teg til ein fittan gamlan mann. So Elly er heppin, sum hevur teg at heita á, tá smá ørindi skulu gerast. Handalagið hevur altíð verði framúr gott, og kemur tað tær nú til góðar.

Sum pabba var leiðari á sjónun, so hevur tú mamma verið "leiðari á heimavølli". Vit minnast við takksemi, at tú altíð "var har" tá ogur trongdu til tín. Vit minnast tá tú samlaði ogun til bøn, tá havið leikaði í, og vit vóru bangin fyri at missa pabba. Vit minnast tá lagkøkan bleiv full av øsku, tá vit grillaðu í haganum, men tú visti ráð. Raðfestingina, um at børnini komu fyrst, vilja vit takka fyri. Eitt gott og trygt heim, fult av kærleika og umsorgan, tað er tað vit hava fingið við okkum sum fyrimynd. Mangan hevur tú glett okkum,við tí tú fær frá hondini við stokkum so væl sum heklinál. Nú er familjan vorðin so stór, 10 børn og svigarbørn, heili 15 ommubørn og 8 langommubørn, men tað ótrúliga er, at tú minnist tey øll á merkisdøgum.

Vit gleða okkum at verða saman við tykkum til hátíðarhaldið, og ynskja at Harrin skal styrkja og signa tykkum. Takk fyri at tit søgdu JA fyri 60 árum síðani, og at tit hildu fast við tað.

Heilsan

**Børnini**

### 80 ára føðingardagur

Týsdagin 22. november verður Sámal Jákup Petersen, Kvívík, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá Rúnu og Petur, Frammi í Gerði, frá kl. 10.00-14.00.

### Brúdleyp

Leygardagin 19. november kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Beinta Wilhelm, Tórshavn og Brian Jensen, Norðskáli. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í B36 húsinum kl. 19.00.

### Gullbrúdleyp

Leygardagin 19. november hava Hanna og Osmund Olsen, Gøtugjógv, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við systkjum og børnum.

## Navnabroyting

Við hesum verður sagt frá at: Guðrun Olafsdóttir Olsen, Kári Holm Olsen, Turid Holm Olsen og Heini Holm Olsen, hava broytt navn, soleiðis at fulla navn teirra er: Guðrun við Rættará, Kári við Rættará, Turid við Rættará og Heini við Rættará

Margaret D. Djurhuus:

# Ráðgevur um trygging, pensjón og íløgur

Tann 1. november 2005 byrjaði Margaret D. Djurhuus í nýggjum starvið á Fíggjardeildini í Føroya Sparikassa í Havn. Í nýggja starvinum ráðgevur Margareth kundum í Sparikassanum um trygging, pensjón og íløgur.

Síðani mars í ár hevur Sparikassin selt eina heildarloysn til privatkundar og arbeiðspláss. Tað merkir, at saman við pensjónsuppsparingini kunnu lívs- og óarbeiðsføristryggingar knýtast. Í Sparikassanum fáa fólk eisini ráðgeving um, hvussu pensjónsuppsparingin kann setast í virðisbrøv, so meira kann fáast burturúr.




Margareth D. Djurhuus er 30 ár og úr Gøtu. Hon byrjaði í Sparikassanum í 2000. Á myndini er hon í samrøðu við Sonna Smith frá Rás 2, ið prátaði við hana um tryggingar og pensjónir í sambandi við North Atlantic Fish Fair fyrr í ár.